# Oljufólk skulu súkla

Hjá teimum, sum arbeiða á einum oljupalli, er súklan neyvan tað, sum liggur frammarlaga í tankanum, tá tey skulu út á pallin. Men hóast tað hava arbeiðsfólk á einum donskum oljupalli í Norðsjónum nú boðað frá, at tey vilja fegin taka lut í átakinum "Vi cykler på Arbejde", sum danska súklufelagið skipar fyri, og sum byrjaði í gjár. Sten Falkenberg hjá súklufelagnum sigur, at tað eru ikki øll, sum hava umstøður til at súkla til arbeiðis, men at kunnu súkla á arbeiðsplássinum ístaðin fyri. Tað kunnu tey á oljupallunum eisini, og lopið er ikki so langt, tí sambært Sten Falkenberg verða venjingarhølini á pallunum nógv brúkt.



# Fleiri ferðafólk í mars

Heldur fleiri sengur vóru upptiknar um næturnar á teimum íslendsku hotellunum í mars í ár enn í sama mánaði í fjør. Tølini hjá hagstovuni í Reykjavík vísa, at í mars í ár vóru 84.700 gistingar ímóti 83.000 í sama mánaði í 2008. Tað er ein vøkstur upp á tvey prosent. Hagtølini vísa, at vøksturin var sera ymiskur frá einum landsparti til annan. Eitt ú vóru gistiungarnar 18 prosent færri á Eysturlandinum, meðan tær vóru 23 prosent fleiri á Suðurlandinum. Íslendsku hotellini hava annars havt heldur færri gistingar higartil í ár enn somu tíð í fjør. Fyrsta ársfjórðingin í ár vóru gistingarnar 212.000 ímóti 219.000 somu mánaðir í 2008.



*Hjúnini, Jan Højgaard og May í Túni Højgaard, við køksborðið í heimi teirra á Toftum. Hetta er ikki ein stór borg, men eini sera hugnalig, eldri hús. Hann er formaður í Fiskimannafelagnum; hon er lærari við Glyvra skúla*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Sjálvur ásannar Jan, at nógv var og framvegis er at seta seg inni í.

– Eitt er tey forrit, sum vit hava í bókhaldinum og í hagtalsskipanini í felagum. Annað og ikki minni týðandi eru øll tey viðurskifti, sum okkara limir og felag er fevnt av.

Jan ásannar, at hann framvegis hevur nógv at læra og nógv at seta seg inn í.

– Eg væntaði, tá eg tók við sum felagsformaður, at eg skuldi hava eini seks ár til at venda "skútuni", sum hann tekur til.

Hann sigur, at hansara áhugi ikki minst liggur í teimum sosialu viðurskiftunum hjá fiskimonnum og sjófólki, og haraftrat eru onkrir sáttmálar og ymisk viðurskifti, sum kundu verið betri.

– Men í fyrsta lagi ræður um, at vit sum felag umboðandi okkara limir syrgja fyri, at verandi sáttmálar verða hildnir.

Felagsformaðurin fegnast um, at ALS-skipanin nú væntandi verður broytt til fyrimuns fyri hansara limir.

– Eg dugi væl at síggja, at neyðugar broytingar í ALS-skipanini, sum gera viðurskiftini hjá fiskimonnum betri og rættvísari, hava verið ein tungur burður hjá mínum undanmanni. Í stýrinum vóru fólk, sum arbeiddu ímóti neyðugum tillagingum, leggur hann aftrat.

## Stillar uppaftur

Seint í heyst verður aftur høvi hjá monnum, sum vilja umboða fiskimenn, at stilla upp til felagsformansval í Føroya Fiskimannafelag.

Tað eru fimm sóknir/skipsmanningar, ið kunnu stilla valevni upp, men verður einki mótvalevni, og sitandi formaður einki hevur ímóti at halda fram, verður hann sitandi í fyribils eitt skeið aftrat.

– Verandi formansskeið hjá mær gongur soleiðis út 1. februar í 2010, men eg kann longu nú siga, at eg eri til reiðar at taka eitt tørn aftrat.

Jan sigur, at hann hevur ongantíð angrað, at hann læt seg stilla upp, men hann ásannar kortini, at hann mangan hevur verið rættiliga troyttur.

– Í tíðarskeiðnum, eg havi verið formaður, havi eg líkasum eisini verið málsviðgeri hjá limum, sum á ymiskan hátt totalt eru dotnir niður ímillum í skipanini og ongan góðan hava sæð seg at hava. Hetta hevur kanska serliga verið vegna sjúku.

Hann sigur, at málið hjá honum er, at tað í størri mun verða onnur á skrivstovuni, sum koma at taka sær av málsviðgerð, soleiðis at hann sum felagsformaður fær betri stundir til at taka sær av øðrum viðurskiftum, sum felagið eisini arbeiðir við.

Eitt av teimum málum, sum hava kravt tíð og orku, er flytingin av tryggingarviðurskiftunum hjá fiskimonnum – úr LÍV og til danska felagið, ALKA.

– Arbeiðsorkan hjá mær røkkur ikki til allar tær uppgávur, sum felagið hevur, sigur Jan, sum annars sigur seg hava nøkur góð og dugnalig fólk á skrivstovu síni á Bryggjubakka.

## Onkur mist móti

Jan hevur verið í nøkrum orrustum, síðan hann gjørdist formaður í FF, og longu tá hann hevði sitið í starvinum í minni enn eitt ár, legði hann allan fiskiskipaflotan, sum kom í føroyska havn. Hann hevur verið í drúgvum stríði um sáttmálar, og hann hevur í hesum sambandi eisini upplivað, at onkur av hansara limum hava vent honum bakið, tí teir hildu, at kósin var í so harðrend. Aftrat hesum og helst øðrum tingum, vit ikki eru vitandi um, er felagsformaðurin í minsta lagi eina ferð komin í ta støðu, at hinir limirnir í nevndini hava skrivað undir sáttmála, sum Jan ikki kundi taka undir við. Soleiðis kom hann í minniluta um eitt nú sáttmálan við JFK, sum eigur og rekur pelagiska skipið, Næraberg.

– Jú, tað er rætt, at onkur fiskimaður er vorðin eitt sindur frustreraður og kanska hevur mist mótið. Hinvegin havi eg í mínum starvi merkt, at eg havi flestu limir og stuðlar mínar "inntaktar".

Jan vísir á, at flestu fakfeløg, sum eru komin nakran veg, sum hann tekur til, hava ført ein rættiliga kontantan fakfelagspolitikk.

– Vit eru noyddir at halda fast um teir sáttmálar, vit hava, og hetta gangi eg sum felagsformaður rættiliga høgt uppí. Eg haldi eisini, at onkur sáttmáli kundi verið eitt sindur betri enn í dag, og hetta eru viðurskifti, vit mugu taka upp við reiðararnar, sigur hann.

## Samstarv í Samtak

Felagsformaðurin dylur ikki fyri, at hann er sera væl nøgdur við samstarvið, sum fakfeløg hava í Samtaki. Tað eru Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Fiskimannafelag, sum hava skipað seg og eru við í hesum samtaki.

– Eg haldi, at tað í alt ov stóran mun hevur eydnast at spjaða fakfelagsrørsluna – og ikki minst millum fiskimenn og arbeiðsfólk. Hetta hevur gjørt okkum nógv veikari.

Tá vit spurdu Jan Højgaard, um sjónarmiðini hjá arbeiðsfólki og fiskimonnum ikki kunnu vera torfør at sameina á summum økjum, eitt nú í sambandi við landingar í Føroyum og/ella uttanlands og møguligari virking av fiski umborð á føroyskum skipum, sigur Jan:

– Sjálvandi kanst tú altíð finna sjónarmið og støður, sum ikki eru júst tey somu hjá øllum trimum pørtunum í samtakinum, men tað, sum ræður um, er at samstarva og standa saman um mál, sum eru felags og royna at finna gongdar leiðin í øðrum málum – leiðir, sum tæna arbeiðsfólki, fiskimonnum og samfelagnum í síni heild. Eg haldi, at Samtak er eitt stórt frambrot innan føroyska fakfelagsrørslu, og eg ivist onga løtu í, at vit saman framhaldandi fara at hava eitt gott samstarv.

## Gjalda sjálvir

At enda spurdu vit Jan Højgaard, hvat hann heldur um, at ávísir politikarar nú eru farnir at tosa um, at almenna inntøkutrygdin skal leggjast út til partarnar á arbeiðsmarknaðinum – í hesum førinum fiskimenn og reiðarar at gjalda sjálvir.

– Nei, hesum taki eg slett ikki undir við. Inntøkutrygdin er onga krónu ov høg, og mín viðmerking til hesi sjónarmið er stutt ov greitt, at fiskimenn longu nú gjalda sína inntøkutrygd sjálvir. Hetta gera teir um skattin, leggur felagsformaðurin aftrat.

***»… eg eri ímóti at avtaka almennu minstulønartrygdina. Fiskimenn gjalda sína inntøkutrygd sjálvir. Hetta gera teir um skattin…«***

***(Jan Højgaard)***

***»… vit vóru ógvuliga spent til formansvalið, og tá avtornaði, gjørdist Jan fremstur. Eg var ovfarin og ógvuliga fegin hansara vegna…«***

***(May í Túni Højgaard)***